



*– Ja her var eg ungur og penur,*
*Nú eri eg bara penur...*



*Eli Smith og Rainar Bohnhof í Spania í 1974*



*Meðan eg sigldi við danska nótabátinum Strømegg, vóru ein skipsfelagi, Oddur Jensen úr Skopun, og eg eina viku á Ibiza. Flestu føroyingar kennast við Ibizasaltið, sum saltkongurin Hans Pauli Johannesen umboðaði. Ibiza er ein av Balearoyggjarnar oyggjunum. Kendast av teimum er Mallorca, sum er væl størri enn Ibiza*

ein sovorðin ljósasløkkjari. Eg gloymdi at siga, at vit sigldu bæði niður til Danmarkar og uppaftur við Tjaldrinum, sum endaði sínar dagar í Chile. Soleiðis var skilið tá!

## Eli í Epania í 1974

Í 1974 vóru hesir vøkru unglingarnir í Costa Del Sol. Um tit skuldu verið í iva, hvørjir teir eru, so eru tað Jákup Simonsen úr Fuglafirði, Jóannes Hansen úr Klaksvík og eg. Eftir at hava steðgað í Keypmannahavn í tveir dagar, flugu vit spentir og lívsglaðir til Spania. Nú skuldu vit rættiliga njóta tað. Komu til Toromolinos, sum er ein gamal fiskarabýur, men sum so nógvir aðrir býir í Andalusia, so sóu tey her sær størri vinning í ferðavinnuni.

Vit búðu á týskum hotelli, sum lá nakað niðan frá strondini, eitt gott hotell við svimjuhyli, kafé og øllum hentleikum. Tá vit ikki sólaðu okkum, vóru vit og handlaðu ella í barruni. Minnist ein guitarspælari, sum setti sín dám á, vit høvdu fortalt honum um Føroyar, og um at Føroyar var ein fiskuvinnutjóð. So tá vit komu í kaféina næstu ferð, stóð hann frammanfyri okkum og við guitarinum næstan uppi undir nøsini improviseraði hann ein sang um Føroyar, "Faroe tralla de Bacalao".

Í kaféini var ein skotsk genta, sum dugdi væl at tekna andlitsmyndir, og vit tríggir lokkaðu hana at tekna okkum, og har sótu vit sum model.

Størsta hendingin á ferðini var tað, tá ið vit á hotellinum fingu vitjan av tveimum fótbóltspælarum á týska landsliðinum, sum bara nakrar vikur frammanundan var vorðið heimsmeitari í fótbólti á heimavølli. Teir vóru Berti Vogts og Rainar Bohnhof, sum báðir vóru frá Borussia Mönchengladbach, sum tá var eitt tað kendasta felagið í Vesturtýsklandi. Allan Simonsen spældi eisini í tí felagnum tá.

Fólkið flokkaðist sjálvandi um hesar hetjurnar, og vit smæddu okkum heldur ikki burtur. Tað eydnaðist at fáa autograf og mynd avtikna av okkum saman við teimum, og tit kunnu ætla at vit vóru stoltir av tí.

## Eli í Spania í 1978

Meðan eg sigldi við danska nótabátinum Strømegg, vóru ein skipsfelagi, Oddur Jensen úr Skopun, og eg eina viku á Ibiza. Flestu føroyingar kennast við Ibizasaltið, sum saltkongurin Hans Pauli Johannesen umboðaði. Ibiza er ein av Balearoyggjarnar oyggjunum. Kendast av teimum er Mallorca, sum er væl størri enn Ibiza.

Ibiza er kent frítíðarstað, sum hevur verið nógv vitjað síðani eina ferð í trýssunum. Her slappaðu vit báðir ungkarlarnir okkum og slappaðu av eftir tríggjar strævnar mánaðir á sjónum. Vit leigaðu bil og koyrdu alla oynna runt og kannaðu vakra landslagið. Serliga vakurt var har norðuri at síggja mandul, oliven og figutraðsplantagurnar, og eisini tey skógarklæddu fjøllini. Minnist ein regndag tá ið vit koyrdu uppi í fjøllunum eftir smølum grúsvegum, og tá ið vit at enda komu oman móti havinum til lítla og óspilta bygd. Vit fóru inn í tað lokalu matstovuna at fáa okkum ein bita. Eg minnist, hvussu hugnaligt tað var at sita og eta í primitivu matstovuni, meðan regnið oysti niður á takið. Onkur av teimum lokalu vóru á matstovuni. Tey hugdu at okkum. Tað var eyðsýnt, at tey vóru ikki von við at hava fremmanda fólk.

Ofta eru tað sovorðnar øðrvísi hendingar, sum tú minnist aftur á.




*Tarvafektan er eitt »must« í Spania*